LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# Varraglitur elvir til ovurviðkvæmi



**FLEIRI** AV TEIMUM VANLIGASTU **VARRAGLITRUNUM** INNIHALDA **EVNI**, IÐ KUNNU ELVA TIL **OVURVIÐKVÆMI**. TAÐ VÍSUR EIN **KANNING**, SUM **ES** HEVUR LATIÐ GJØRT

Nógv av tí, sum er í smyrsli, kann elva til ovurviðkvæmi. Tey farligastu evnini eru luktilsini, ið eru í kremi, ella sum í hesum føri í varraglitri.

ES hevur sum regul, at 26 av teimum evnum, ið eru prógvað at elva til ovurviðkvæmi, skulu vera skrivað á pakkan. Av teimum 26 vóru tað 9 í kannaða varraglitrinum.

Varraglitrið frá L'Oreal, Body Shop og Maybelline innihalda fleiri av evninum, ið eru prógvað at elva til álvarsligt ovurviðkvæmi.

Í varraglitri frá Lancome vóru evnini Limonene og Linalol, ið kunnu elvað til eksem og turra húð.

Av tí at varraglitur er sera vælumtókt millum ungar gentir, er tað sera álvarsligt, at tey innihalda so nógv slík evni. Ung eru í størri vanda at fáa ovurviðkvæmi enn vaksin.

Húðin á varrunum er eisini sera tunn, og tí fara evnini beinleiðis inn í blóðið.

Tey merki, ið ikki innihalda nøkur slík evni, eru Isadora, Clinique og MaxFactor.




**Max Factor Vibrand Curve Effect Gloss**
10 ml
Heldur sær: 24 mánaðir
Innihald: Onki skriva

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 18%
Eftir 4 tímar 16%

***ONGI EVNI, IÐ ELVA TIL OVURVIÐKVÆMI***




**Body Shop Hi Shine Lip Treatment**
14 ml
Heldur sær: 36 mánaðir
Innihald: Á klisturmerkinum

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 26%
Eftir 4 tímar 19%

***INNIHELDUR EVNI, IÐ ELVA TIL OVURVIÐKVÆMI***

**BEST**




**Isadora Pump'n Plump**
**10 ml**
**Heldur sær: 18 mánað ir**
**Innihald: Á klisturmerkinum**

***Test av fukt á vørrunum (í prosent)***
**Eftir 2 tímar 14%**
**Eftir 4 tímar 23%**
**Ongi evni,ið elva til ovurviðkvæmi**

***ONGI SKAÐILIG EVNI OG NÓGV FUKT***




**Clinique Superbalm Moist Gloss**
15 ml
Heldur sær: Onki skriva
Innihald: Á pakkanum

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 22%
Eftir 4 tímar 14%

***ONGI EVNI, IÐ ELVA TIL OVURVIÐKVÆMI***




**L'Oreal Glam Shine Blush**
6 ml
Heldur sær: Onki skriva
Innihald: Á klisturmerkinum

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 22%
Eftir 4 tímar 18%

***INNIHELDUR EVNI, IÐ ELVA TIL OVURVIÐKVÆMI***




**Lancome Juicy Tubes Ultra Shine**
15 ml
Heldur sær: Onki skriva
Innihald: Á pakkanum

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 20%
Eftir 4 tímar 27%

***INNIHELDUR EVNI, IÐ ELVA TIL OVURVIÐKVÆMI***




**Maybelline Watershine Gloss**
10 ml
Heldur sær: Onki skriva
Innihald: Á klisturmerkinum

*Test av fukt á vørrunum (í prosent)*
Eftir 2 tímar 23%
Eftir 4 tímar 13%
Inniheldur evni, ið elva til ovurviðkvæmi

**VÁNALIGT**

***INNIHELDUR SKAÐILIG EVNI OG TURRISLIGT***